# Endiliga fríkend

**Týsdagin vóru ein kvinna og ein maður, sum hava sitið fongsulsrevsing fyri at hava gjørt seg inn á børnini hjá kvinnuni, endaliga fríkend av Landsrættinum. Nú verður arbeitt við at reisa endurgjaldskrav**

FRÍDØMING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Nina Kruse er ikki beisk inn á børnini hjá sær, sum søgdu ósatt í rættinum, og harvið vóru høvuðsorsøkin til, at hon noyddist at sita 16 mánaðir í fongsul*

*Mynd: Dimma-Kalmar*

Tey hava vitað tað leingi, at Eystari Landsrættur í gjár fór at fríkenna tey fyri at hava gjørt seg inn á børnini, men tað varð tó ikki fyrr enn á rættarfundinum í gjár, at tað veruliga gekk upp fyri tey bæði dømdu, at tey nú eru endaliga fríkend.

### Vil hava børnini aftur

Tey bæði blivu dømd, tí at børnini hjá kvinnuni áður í Føroya Rætti og Landsrættinum hava greitt frá, at mamman og maðurin, sum hon tá livdi saman við, høvdu gjørt seg inn á tey. Seinni hava børnini tikið frágreiðingarnar aftur, og tí vóru kvinnan og maðurin í gjár fríkend í Eystara Landsrætti.

Tann dømda kvinnan, Nina Kruse, hevur sitið 16 mánaðir í fongsul, og hetta var ein sera hørð tíð, har hon varð noydd til at skifta fongsul fleiri ferðir, tí hon ikki fekk verið í frið fyri øðrum fangum.

Tann tíðin, meðan sakarmálið koyrdi, og meðan Nina Kruse sat handan rimar, hevur tikið ógvuliga hart upp á 43 ára gomlu kvinnuna, og hevur millum annað havt við sær, at hon so at siga ikki er før fyri at hava eitt vanligt arbeiði longur.

Nina Kruse sigur, at tað hevur verið ótrúliga hart, men at hon tó ikki hartar børnunum fyri at hava sagt ósatt í rættinum.

### Stjúkmamman verður kannað

Tað er nógv, sum bendir á, at tað er stjúkmamman, ið livdi saman við pápanum hjá børnunum, ið hevur noytt børnini til at lúgva um gerðirnar hjá mammuni og táverandi sambúgva hennara.

Børnini hava seinni greitt frá, at stjúkmamman hevði sagt við tey, hvat tey skuldu siga við løgregluna og í rættinum. Hetta, sum børnini søgdu, varð seinni grundarlagið undan avgerðini hjá bæði Føroya Rætti og Eystara Landsrætti um at senda tey bæði handan rimar.

Nú Nina Kruse og fyrrverandi sambúgvi hennara eru fríkend, er spurningurin so, hvat ið nú skal henda. Hjá ákæruvaldinum verður upplýst, at avgerð er tikin um ikki at seta børnini fyri rættan, tí at tey hava sagt ósatt. Hinvegin arbeiðir løgreglan við málinum um stjúkmammuna, sum fekk børnini at siga ósatt, og neyvan er síðsta orðið sagt í tí málinum.

### Arbeiða við endurgjaldskravi

Nú tey bæði eru fríkend, arbeiða advokatarnir hjá teimum við at reisa eitt endurgjaldskrav fyri tíðina, ið tey hava sitið í fongsul. Tá ið endurgjaldskravið er reist, leggur ákæruvaldið tað fyri ríkisadvokatin, sum síðani skal taka støðu til, um hann góðtekur kravið, ella um hann vil hava tað avgjørt í rættinum, verður upplýst hjá ákæruvaldinum í Havn.

Bjørn á Heygum, sum er advokatur hjá tí dømda manninum, sigur, at tað skuldi ikki tikið so langa tíð, áðrenn endurgjaldskravið er klárt. Hann sigur, at í slíkum førum tekur man útgangsstøði í nøkrum standardupphæddum, ið eru ásettar fyri hvønn dag, ið viðkomandi órættvíst hevur sitið handan rimar. Í serligum førum kann upphæddin hækkast, og tað metir Bjørn á Heygum so avgjørt verða galdandi í hesum málinum. Tá verður upphæddin vanligani hækkað 25 prosent.

### Ógvuliga sjáldsamt mál

Slík mál sum hetta, har fólk verða fríkend, eftir at tey hava sitið fongsulsrevsing, eru tíbetur ógvuliga sjáldsom, sigur Bjørn á Heygum. Advokaturin sigur, at tað er positivt, at tað ber til at koma aftur um aftur og fríkenna fólkini, heldur enn at eitt justitsmorð bara bleiv staðfest.

Bjørn á Heygum sigur, at málið hevur verið sera belastandi fyri tey dømdu, og hann heldur, at rætturin neyvan nakrantíð fær rættað fult upp á mistakið. – Tað sár, sum tey nú fríkendu hava fingið av hesum máli, lekist neyvan nakrantíð fult og heilt, sigur Bjørn á Heygum at enda.

# Uppsteðgaður á Kirkjubønesi

Beint fyri døgurða mikudagin kom Pressarin hjá Tórshavnar Skipasmiðju á Havnina við bátinum "Malik", sum var uppsteðgaður við Kirkjubønes. Malik er ein gamal grønlendskur bátur, sum seinastu tíðina hevur ligið á Miðvági. Vandi var ongantíð fyri bátinum ella nøkrum umborð.

tn



*Beint fyri døgurða mikudagin kom Pressarin á Havnina við Malik, sum var uppsteðgaður við Kirkjubønes*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




## Skeið innan trivna og umhvørvi á arbeiðsplássinum

Serfrøðingar frá CRECEA (fyrrv. BST) vóru í Føroyum í juni og hildu seminar innan fleiri av hesum skeiðum, ið vit fara at bjóða nú í novembur. Nógv fólk nýttu høvið at hoyra teir, og eftirmetingarnar vóru ógvuliga góðar.

### Sjúkrafrávera - spill av góðum kreftum

***Endamál***
Endamálið við skeiðnum er at geva luttakaranum størri vitan um orsøkirnar til sjúkrafráveru, og hvussu hon kann minkast.

Skeiðið kemur inn á og gjøgnumgongur ymiskar hættir til handfaran av sjúkrafráveru. Hesir kunnu t.d. verða:
*Minking av sjúkrafráveru:*
- Hvat kann sjúkrafráveran verða eitt úttrykk fyri?
- Fráverusamrøður, hvat kann gerast fyri at minka um sjúkrafráveruna?
- Hvussu fer samrøðan fram?
- Hvørjir møguleikar eru fyri at hjálpa einum starvsfólki?

*Fyribyrging av sjúkrafráveru:*
- Hvussu relaterar sjúkrafráveran til almenna trivnaðin á arbeiðsplássinum?
- Hvussu skal arbeiðið við tema'um sum trivnað, motivatión, samanhangur millum arbeiði og familjulív sum liður í sjúkrafráverutrupulleikanum leggjast til rættis?

***Málbólkur***
Øll, ið arbeiða við sjúkrafráveru og fyribyrging, t.d. leiðarir, trygdar- og álitisumboð.

***Innihald***
Skeiðið er ein blanding av uppleggum, bólkaarbeiði og venjingum, og tekur útgangsstøðið í ymiskum tema'um, sum luttakararnir halda verða aktuel at taka fram.

***Skeiðleiðari:***
Arbeiðs- og organisationspsykolog: Lene Bilde Jacobsen

**Dagar: 8. og 9. nov, kl. 09:00 - 16:00**



### Onnur skeið innan trivna og arbeiðsumhvørvi:

**At skilja og loysa konfliktir**
9. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Psykiskt arbeiðsumhvørvi og organisatiónsmenning**
10. og 11. nov kl. 09:00 - 16:00
**Temadagur: Heilsubetran á arbeiðsplássinum**
10. nov kl. 09:00 - 16:00
**Ergonomiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvið**
11. og 12. nov kl. 09:00 - 16:00

Skeiðlýsingar fyri hesi skeið eru at finna á heimasíðu okkara á www.kvasir.fo.
Vit veita eisini serlig tilboð til stovnar og fyritøkur. Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við okkum um hetta. Vit bjóða okkum eisini til at koma út til tykkara at greiða meira frá hesum skeiðum.

KVASIR

**Tel 320 204 - www.kvasir.fo - kvasir@farodane.fo**



## HAVNAR SØGA I og II – Framsýning í Müllers pakkhúsi

Fríggjadagin 1. oktober 2004 gevur Tórshavnar kommuna út bøkurnar Havnar søga I og II. Høvundar eru Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen.

**Framsýning í Müllers pakkhúsi**
Í hesum sambandi skipar Tórshavnar kommuna saman við Tórshavnar Býarsavni og Føroya Fornminnissavni fyri áhugaverdari framsýning í Müllers pakkhúsi við myndum, kortum, skjølum og tekningum. Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 17.00 til 19.00.

Frá 2. oktober til 24. oktober verður framsýningin í Müllers pakkhúsi opin hvønn dag frá kl. 14.00 til 18.00. Ókeypis atgongd.

**Framsýning í Snarskivuni**
Eisini verður ein framsýning í Snarskivuni. Frá 30. september til 26. november hava Býarsavnið og Landsskjalasavnið framsýning um býarmenningina í tíðarskeiðinum frá 1856 til 1954.

Í Snarskivuni er opið gerandisdagar frá kl. 9.00 til 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.




**Fyrsta og onnur bók av Havnar søgu eru um tíðarskeiðið frá landnámi til 1816.**

**Havnar søga I er um frásagnir og samtíðarlýsingar av Havnini, fornfrøðiligar rannsóknir í gomlu Havnini, ting- og rættarviðurskifti, bóndagarðin Húsagarð og vinnur hjá havnarfólki, einahandilin fram til umleið 1790 og staðanøvn innan- og uttangarðs í Havnini.**

**Havnar søga II er um Vágsbotnshandilin 1768-1793, kongliga handilin frá umleið 1790 til 1816, skansaverkið, hospitals- og heilsuviðurskifti, kirkjurnar, skúlarnar í Havn, og hvussu Havnin veksur og mennist fram til umleið 1816.**